

Borikvinna umborð á Cosl Pioneer, tá hann boraði við Føroyar fyrraárið

# Fleiri kvinnur velja oljuvinnuna

**Jan Müller**

15.01.2014 - 22:59

Oljan.fo

**Oljuvinnan hevur altíð verið ein vinnugrein fyri menn, men nýggj hagtøl vísa, at alt fleiri kvinnur velja oljuvinnuna.**

Hetta vísa tøl frá OilCareers.com, sum siga, at kvinnur, sum hava skrásett seg til at arbeiða í oljuvinnuni er vaksið við 10% kring heimin hetta seinasta árið.

“Tað er hugaligt at síggja, at fleiri kvinnur, serstakliga yngri kvinnur ynskja at fáa arbeiði í olju- og gassvinuni. Nógvar yngri kvinnur geva sær ikki fær um, hvussu nógvir møguleikar eru fyri arbeiði í olju- og gassídnaðinum fyri kvinnur við røttu kvalifikatiónunum, sigur stjórin fyri WISE stovnin, sum er ein stovnur fyri kvinnur innan vísind og verkfrøðifakini.

Tølini eru kunngjørd í frágreiðingini "The Global Oil & Gas Workforce Survey: Expectations for hires and pay rates in the oil and gas industry (H2) 2013", skrivar heimasíða Hegnar Online.

Millum mongu føroyingarnar, sum í dag arbeiða í oljuvinnuni, eru fáar kvinnur. Onkrar eru, sum arbeiða umborð á oljupallum antin sum heilsurøktarfrøðingar, í kantinu ella reingerð. Neyvan finnast tær enn á boridekkinum.